# Serstøk avtala

millum

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

og

Akademikarafelag Føroya

§ 1

Partarnir eru samdir um, at starvssett á sáttmálaøkinum hjá Akademikarafelag Føroya í kommunala geiranum, tað er í kommunalum fyrisitingum umframt hjá SEV og IRF, til eina og hvørja tíð fylgja galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya.

§ 2

Hendan avtala kann uppsigast við í mesta lagi 3 mánaðar freist, roknað frá endanum av tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmálaskeiði millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya. Verður hendan avtala uppsøgd, fer hon úr gildi samstundis, sum táverandi sáttmálaskeið millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya endar.

§ 3

Avtalan verður undirskrivað í tveimum eintøkum, og fær hvør partur sítt eintak.

Tórshavn 12. desember 2018

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Akademikarafelag Føroya